lívdin
- í lívd hins hægsta

September 2009



# Familjan Lützen send út frá Lívdini



*Familjan Lützen verður send út sum trúboðarar*

Seinastu átta mánaðirnar hava vit havt ta gleði at hava Valdimar, Ruth, Anton og Markus saman við okkum í Lívdini. Tey fóru til Danmarkar aftur hálvan august og eru byrjað tænastuna aftur í Måløv. Leiðslan í Lívdini avgjørdi at gera Valdimar og Ruth til trúboðarar okkara við tí ábyrgd, sum við tí fylgir. Sostatt hava vit nú tríggjar fulltíðar trúboðarafamiljur í Lívdini. Tað gleðir okkum, at visiónirnar um trúboðan vaksa, og at vit kunnu hava ein útrættan arm inn í heimsins neyð gjøgnum trúboðarar okkara – bæði teir, sum eru í fulltíðartænastu, og øll hini mongu, sum eru í styttri missiónsverki. Latið okkum biðja regluliga fyri Lützen familjuni.

*J.Z.*



## Honum tykti synd í teimum

Tá ið eg hugsi um Lívdina og tað verk, sum Kristus hevur sett okkum í, so komi eg aftur og aftur til, hvussu Matteus lýsir tænastu Jesusar: Jesus ferðaðist nú um í øllum støðum og bygdum, lærdi í sýnagogum teirra, prædikaði evangelium ríkisins og grøddi hvørja sjúku og hvønn veikleika. Táið Hann sá fólkið, tykti Honum hjartaliga synd í teimum; tí tey vóru illa hagreidd og vanrøktað sum seyður, ið ongan hirða hevur. Tá segði Hann við lærisveinar Sínar: „Skurðurin er stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir. Biðið tí Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð Sín!"
Hann kallaði nú hinar tólv lærisveinar Sínar til Sín og gav teimum vald yvir óreinum andum, at reka teir út, og at grøða hvørja sjúku og hvønn veikleika (Matt. 9:35-10:1). Vit hava í hesum fáu versunum fyrimyndina fyri verki okkara. Fyrst síggja vit hvat Jesus gjørdi – hann sá tørvin og lærdi, prædikaði og grøddi. Síðani síggja vit hjartalag Jesusar – hann hevði umsorgan, tí honum tykti hjartaliga synd í teimum. Til seinast síggja vit, hvussu Jesus útinti sítt verk – hann setti onnur við, sum hann ferðaðist í øllum støðum og upplærdi lærisveinar sínar at vera við í sínum verki. Máttu vit gjørt tað verk, vit eru kallað til, við einum hjartalagi, sum elskar menniskju, og soleiðis eggja teimum at vera við. Hetta er av sonnum at gera lærisveinar!

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Lívdin átta ár

Sunnudagin 30. august varð hátíðarhildið, at átta ár eru liðin, síðani Lívdin byrjaði í leigaðum hølum í verkhúsinum Virkni í Berjabrekku sunnudagin tann 26. august 2001. Jógvan Gerðalíð í Klaksvík, sum fylti 85 ár tann dagin, var við til tað fyrsta møtið, og tað var hann eisini nú, Lívdin hevur átta ár á baki og hann 93.



*Jógvan Gerðalíð*

## Tilukku við føðingardøgunum

Leygardagin 15. aug. hildu hjúnini Jastrud og Sámal Clementsen í Hoyvík 75 + 75 ára føðingardag. Jastrud fylti 5. august og Sámal 21. september. Dagurin varð hildin í húsunum hjá Starvsmannafelagnum í J.H. Schrøtersgøtu.



## Tillukku við barninum

Britt og Birgir Nielsen hava ættleitt sonin Símeon Biskopstø Nielsen.

Símeon er úr Limpopo umráðnum í norðasta partinum í Suðurafrika. Hann er føddur 21.september 2008. Tey fingu hann 27. juli 2009 í Pretoria í Suðurafrika og komu til Føroyar 16. august, eftir at hava bíðað 2 ½ ár eftir honum, sum er teirra fyrsta barn.

Tey siga, at alt hevur gingið fantastiskt. Símeon trívist ómetaliga væl hjá teimum, og tey hava ikki orð fyri, hvussu glað og stolt tey eru fyri at hava fingið ein so fittan beiggja.



## Jóna til Santiago í Chile

Mikudagin 19. august fór Jóna Gunnarsson av landinum á veg til Chile. Hon fór fyrst til Hollands á eina sonevnda Go-konferansu, har øll, sum verða send út frá trúboðanarfelagsskapinum OM, byrja.
Mánadagin 31. august fór hon so víðari til Santiago í Chile, har hon skal búgva saman við 10 øðrum ungum fólkum ymsastaðni



*Jóna Gunnarsson*

frá í heiminum. Saman skulu tey m.a. arbeiða á barnaheimum, umframt at tey fáa bibliu-undirvísing og undirvísing í mentan og sponsk-um. Jóna kemur heim aftur úr Chile í juni 2010.

## TeenStreet 2009

Yvir 200 fólk úr Føroyum vóru við til ungdóms-tiltakið TeenStreet, sum byrjaði leygardagin 1. august í Offenburg í Týsklandi. Farið varð úr Føroyum hósdagin 30. juli til Keypmanna-havnar, og haðani varð koyrt í bussum allan teinin til Offenburg. Legan var til leygardagin 8. august, tá koyrt varð heim aftur, og ferðalagið var aftur í Føroyum sunnudagin 9. august.
Umframt tannáringar vóru leiðarar og hjálpar-fólk við úr Føroyum. TeenStreet-tiltakið hevur gjøgnum fleiri ár havt sera góða umboðan úr Føroyum.





## Tillukku við hjúnabandinum

Leygardagin 1. august giftust í Betesda í Klaksvík Daisy Færø og Edvin Hansen, bæði úr Klaksvík.
Leygardagin 1. august giftust í Kvívíkar kirkju Anni Joensen úr Kollafirði og Ragnar Isaksen úr Kvívík.



*Daisy & Edvin*



*Ragnar & Anni*



*Meifríð & Bryan*



*Ijeoma & Høgni*

Fríggjadagin 7. august giftust í Vesturkirkjuni í Havn Meifríð Weihe Hansen úr Havn og (Bryan) Mahendran Subramaniam frá Penang í Malaysia.
Leygardagin 8. august 2009 var almenn há-tíðarløta í hølum Frelsunarhersins, har brúðar-parið Ijeoma Regina Akpu frá Lagos og Høgni Háberg Hansen úr Havn vórðu signað.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.**

1. sep. Høvi at luta visiónir og dreymar / bønarløta
8. sep. Húsbólkar
15. sep. Høvi at luta visiónir og dreymar / bønarløta
22. sep. Høvi at luta visiónir og dreymar / bønarløta
29. sep. Húsbólkar

## Kunnandi fundur um Christmas Child




Kunnandi fundur var um Operation Christmas Child hóskvøldið 3. sept. 2009 í hølunum á Brekku 3 í Hoyvík. Kvøldið var ætlað at vera til íblástur fyri tey, sum vilja vera við í tiltakinum í ár. Innsavningin er byrjað, og seinasta freist at lata skógvaeskjur inn er sunnudagin 25. oktober. Tað eru Durita Djurholm tel. 230833/316099, Beinta Áargarð tel. 512655/312655 og Gunnvá Áargarð tel. 584496/312655, sum samskipa Christmas Child-tiltakið í Føroyum.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

## Sunnudagin 6. september



Regin

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Visiónin fyri Italia og framtíðin*
*Prát við Regin Guttesen*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir: Tørvur, hjarta og ognarskapur*
*Talari: Jógvan Zachariassen*
** Innsavning til nýggja bygningin*

## Sunnudagin 13. september



Jógvan

Familjumøti kl. 10.30: *Samlast yviri á grundøkinum hjá Lívdini. Lættir sangir, okkurt til børnini og ein stutt hugleiðing um visiónirnar í Lívdini.*
** Bert fyrra møtið - og bert um tað viðrar.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir: Gleðin við at geva*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

## Sunnudagin 20. september



Jens

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Hvat brennur tú fyri og hví?*
*Prát við sunnudagsskúlan og tænastuleiðara*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir: Stóra standmyndin*
*Talari: Jens Wang*

## Sunnudagin 27. september

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Hvør er tørvurin og møguleikin millum børn og ung í Føroyum í dag?*
*Prát við ungdómsarbeiðið*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir: hvat, hví, hvar, nær, hvussu og hvør?*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*